## Fólkaflokkurin yvirhálar næstan Sambandsflokkin á Strondum við krígslok

# Tá bygdin Strendur mundi farið í tvíningar

### Stríðið millum „heimansmenn" og „uttansmenn" á Strondum um eina kei í Heygsstøð undir krígnum er hart og verður politiskt

Í 1883 - 31 ár eftir at Føroya Løgting varð endurreist - verður ein maður í Sjóvar sókn valdur inn í ting fyri fyrstu ferð.

Tað er einalærarin Jógvan Poulsen á Strondum.

18. august 1906 boða 13 av 22 tinglimum frá í *Dimmalætting,* at teir hava skipað seg í ein politiskan flokk á tingi. Teir nevna seg „sambandsmenn".

Jógvan Poulsen er ein teirra.

Eisini ein annar maður í Sjóvar sókn telist millum teirra, sum eru við til at stovnað Sambandsflokkin.

Tað er Andreas Weihe, kongsbóndi á Selatrað, sum situr á tingi fyri Sambandsflokkin í 7 ár.

Sama árið, í 1906, fær ein annar flokkur, Sjálvstýrisflokkurin, sæti á tingi, hóast hesin flokkur ikki formliga verður stovnaður fyrr enn í 1909.

Tjóðskaparbyltingin, sum byrjaði við jólafundinum annan jóladag í 1888, hevur í stóran mun elvt til, at føroyingar nú hava fingið tveir politiskar flokkar á tingi.

Tað verða so hesir báðir flokkarnir, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum einsamallir koma at mynda politiska landslagið í Føroyum heilt fram til 1928.

Strandingar og fólk í hinum bygdunum í Sjóvar sókn ivast ikki í, hvar krossurin skal setast, tá val er.

Sambandsflokkurin er størsti flokkur og hann bara veksur.

So dyggiliga taka fólk í sóknini undir við ríkisfelagsskapinum, at á løgtingsvalinum í 1920 verða ikki færri enn *tveir* mans valdir inn á ting fyri Sambandsflokkin.

Báðir búgva teir á Strondum og báðir eru teir lærarar.

Teir eru Jógvan Poulsen og Jóhan Poulsen.

Jóhan Poulsen verður settur sum lærari á Strondum í 1917, tá Jógvan Poulsen fer úr starvi.

Hesir verða báðir afturvaldir í 1924 og koma at sita á tingi saman í 8 ár.

Í 1928 gevst Jógvan Poulsen í politikki eftir at hava sitið á tingi í 45 ár.

Jógvan Poulsen er ættaður úr Svínáum.

Ofta man hann hava suffað og inniliga ynskt, at hann valdi sær eitt annað lívsstarv.

Hann tekur lærarapróg á Føroya Lærarskúla í 1876 og verður tá settur sum lærari á Strondum, Skála, Selatrað og á Morskranesi.



Jógvan Poulsen (nr. 2 frá høgru) millum aðrar sambandsmenn



Gamli skúlin á Strondum

Hann kemur tó mest at starvast sum einalærari á Strondum.

Jógvan giftist við Siggu Catrinu Sofíu Petersen, som er dóttir Niels, *Hósvíks-Niels*, og Elisabeth Petersen. Tey búgva úti í Hoygarð.

Jógvan er ein friðarligur og sáttligur maður, men hann hevur ikki tak á næmingum sínum, sum eru nógvir í tali á Strondum.

Sum hjá fleiri øðrum mentamonnum, sum starvast sum lærarar, m.a. einum kendum skrivandi manni úr Sandvík, maktar hin skeggprýddi og tignarligi Jógvan ikki næmingar sínar.

Serliga eru tað nakrir dreingir, sum eru herviligir at gera hesum skúlameistaranum fortreð – hesum manni, sum skrivar fyrstu bíbliusøguna á føroyskum, sum Føringafelagið gevur út í 1900, og sum eisini, saman við Chr. Ludvig Johannesen, skrivar fyrstu stavingar- og lesibókina: *Førisk ABC og Lesingabók 1891.*

Tað ger ikki støðuna hjá honum betri, at kona hansara gongur av vitinum, verður „svøk", sum fólk so bersøgin lýsa sinnisstøðuna hjá Siggu. Livimátin hjá henni er ikki góður heldur.

-Tinna, mamma mín, gekk í skúla hjá Jógvani. Hon minnist, at boð komu til hansara í skúlanum ein dagin um, at tað stóð illa til hjá konu hansara. Hann fór tá rennandi út úr stovuni og skundaði sær heim. Hon doyði stutt eftir. Hetta man hava verið í 1915 ella 1916, sigur tann nú 84 ára gamli Arnold Abrahamsen.

Jógvan Poulsen er útlúgvaður, tá hann 30. september í 1917 verður loystur úr starvi sínum sum lærari.

Hann býr framvegis mest á Strondum, nú hann er farin frá, men onkuntíð loysir hann Andras Samuelsen av sum sýslumann í Fuglafirði, tá hesin er í fólkatinginum.

Við hvørt býr hann í Havn eisini.

Tá Jógvan er á Strondum, heldur hann til hjá keypmanninum Hans Jacob Johansen og konu hansara Anne Marie. Anne Marie er systir konu Jógvans, Siggu.

Hans Jacob og Anne Marie búgva fyrst úti í Hoygarð, men flyta seinni heim í Dávagerði.

Jógvan er 86 ára gamal, tá hann doyr 21. januar 1941.

Ein, sum fylgir Jógvani Poulsen, tá hann fer til gravar og verður jarðaður í gamla kirkjugarðinum á Strondum, stúrsar við yvir taluna, sum presturin heldur við grøvina hjá Jógvani.

Prestur sigur í talu síni, at Jógvan var fyri tí vanlagnu at missa konu sína tvær ferðir.

Fyrru ferð var, tá hon misti vitið, og so misti hann hana aftur aðru ferð, tá hon andaðist.

Tann, sum tekur við sum einalærari eftir Jógvan Poulsen í 1917, fær ikki trupulleikar við diciplinini millum næmingarnar í Stranda skúla - hvørki tá ella seinni.

Hann eitur Johan Poulsen, er 27 ára gamal og kemur av Toftum.

Millum næmingarnar og millum bygdarfólkið verður hann skjótt bara róptur *Poulsen.*

Jóhan Poulsen fer, eins og undanmaðurin í starvinum, út í Hoygarð at fáa sær konu.

Hann giftist við Janu, dóttir keypmannin Hans Jacob og Anne Marie Johansen.

Næmingarnar hava stóra virðing fyri Poulsen alla ta tíð, hann er lærari, og tey bera alsk til hansara eyðsýndu rættvísiskenslu. Við fastari hond fyllir hann barnalærdómin inn í høvdini á fleiri ættarliðum av dreingjum og gentum, til hann leggur frá sær í 1958.

-Mamma fór úr skúlanum í 1918. Hon segði altíð, at hon lærdi meira hetta eina árið hjá Johan



Vit hóma gamla  skúlan og gomlu dansistovuna har heimi

# Á Strondum eru bert 7 atkvøður á muni millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin við krígslok



Við valið í 1936 er Sambandsflokkurin nógv tann størsti flokkurin á Strondum og á Selatrað, meðan Javnaðarflokkurin er størstur á Skála, sum tá hoyrdi til Sjóvar sókn.

Val er aftur í 1940, men tá er nógv hent.

9. apríl 1940 verður Danmark hersett av Týsklandi og 12. apríl verða Føroyar hersettar av Bretlandi.

Meðan kríggið leikaði á, kundi einki politiskt samband vera millum Føroya og Danmarkar. Tí máttu føroyingar klára seg sjálvar undir krígnum.

25. apríl verður Merkið viðurkent av bretskum myndugleikum og 9. mai verður ein bráð-feingisstýrisskipan sett í gildi, sum gevur Løgtinginum lóggávuvald og amtmanninum útinnandi vald.

Í 1940 stillar Fólkaflokkurin upp fyri fyrstu ferð.

Sambandsflokkurin verður framvegis størsti flokkur á Strondum og á Selatrað á valinum í 1940, meðan munurin minkar millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin á Skála.

Á valinum í 1943 tódnar Sambandsflokkurin, bæði á Strondum og á Selatrað. Hin trý ára gamli Fólkaflokkurin veksur í stórum og fer frá trimum upp í 38 atkvøður á Strondum. Fólkaflokkurin gerst størsti flokkur á Skála við 45 atkvøðum.

Á valinum í 1945 - sama ár, sum kríggið endar – minkar munurin millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin av álvara á Strondum. Tað er um reppið, at Fólkaflokkurin fer fram um Sambandsflokkin í atkvøðutali. Tað eru nú bara 7 atkvøður á muni millum Sambandsflokkin og Fólkaflokkin. Sambandsflokkurin fær 109 atkvøður og Fólkaflokkurin fær 102 atkvøður á Strondum. Á Skála er Fólkaflokkurin størstur.

Á valinum 8. nov. í 1946, sum verður hildið aftaná, at løgtingið varð sent til hús eftir fólkaatkvøðuna 14. sept. sama ár, verður Sambandsflokkurin aftur nógv tann størsti flokkurin á Strondum. Hann fær nú 123 atkvøður, meðan Fólkaflokkurin fær 89. Á Skála er Fólkaflokkurin tó framvegis størstur.

**Kelda:** *Valtøl,* Einar Waag: *Val og valtøl 1906-1966*

Poulsen enn øll hini 6 árini hjá Jógvani, sigur Arnold Abrahamsen.

Strandingar og eysturoyingar velja Poulsen so trúliga inn á ting fyri Sambandsflokkin ár eftir ár.

Tað gera teir í samfull 50 ár.

Í hesum langa tíðarskeiði fara nógvar politiskar rembingar fram í Føroyum og ymisk rák taka seg upp, sum bera á hendan og handan bógvin, bæði ríkisrættarliga og búskaparliga, men



**Jóhan Poulsen millum aðrar løgtingsmenn og Hilbert, amtmanni, undir krígnum**

tey fyrstu nógvu árini vísir seg tó einki at skala trygga løgtingssessin hjá sambandsmanninum Johan Poulsen.

Í 1924 fær Danmark sína fyrstu socialdemokratisku stjórn við Thorvald Stauning sum forsætisráðharra..

Árið eftir kemur ein dani, Hans Nielsen, upp til Føroyar at kunna føroyingar um socialdemokratisku hugsjónina. Størsti íblásturin fyri hesi hugsjón í Føroyum kemur helst sunnan av Tvøroyri.

Ein nýggjur flokkur verður stovnaður, sum tekur sosial atlit inn í føroyskan politikk.

Javnaðarflokkurin kemur fyrstu ferð á ting í 1928, men javnaðarhugsjónin ber ikki rættiliga við á Strondum - heldur ikki, tá tíðirnar eftir heimskreppuna versna í 1930-árunum og rættilig neyð er mangastaðni.

Á Skála verður Javnaðarflokkurin tó størsti flokkur, bæði á valinum í 1936 og í 1940.

Johan Poulsen situr enn tryggur í sínum sessi í løgtinginum.

# Løgtingsmenn, valdir í Sjóvar sókn



**Joen Poulsen**

Jógvan Poulsen er føddur 19. februar 1854 í Svínáum, deyður 21. januar 1941. Jógvan var lærari frá 1876 til 1917. Hann var løgtingsmaður fyri Eysturoy 1883-1928 - frá 1906 umboðaði hann Sambandsflokkin.



**Andreas Weihe**

Andreas Hans Emil Christian Weihe er føddur 7. juli 1867 á Selatrað, deyður 16. november 1946. Andreas var kongsbóndi á Selatrað. Hann var løgtingsmaður fyri Eysturoynna frá 1903 til 1910. Hann var millum teirra, sum stovnaðu Sambandsflokkin



**Johan Poulsen**

Johan Martin Frederik Poulsen er føddur 25. september 1890 á Toftum, deyður 24. juni 1980. Hann var lærari frá 1908 til 1958. Hann var løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin frá 1920 til 1970 – í 50 ár, sum er føroyskt met. Tingformaður var hann í 15 ár.



**Johs. M. Olsen**

Johannes Martin Olsen er føddur 4. oktober 1933 á Strondum. Hann hevur arbeitt sum maskinmeistari, trúboðari og fyristøðumaður á Sjómansheiminum í Runavík. Hann var løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin frá 1970 til 1988.



**Edm. í Garði**

Edmund í Garði er føddur 4. juli 1928 á Strondum, deyður 1. januar 1994. Hann var lærari, seinni skúlastjóri, frá 1950 til hann doyði. Edmund var løgtingsmaður fyri Fólkaflokkin frá 1978 til 83.



**Helgi Abrahamsen**

Helgi Abrahamsen er føddur 24. november 1966 í Fuglafirði. Frá 1999 til 2008 var Helgi floksskrivari hjá Sambandsflokkinum. Síðani 2008 hevur hann verið løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin.

Aftur í 1935 kemur røringur í føroyskan politikk og enn ein nýggjur flokkur verður stovnaður. Tað er Vinnuflokkurin, sum á løgtingsvalinum í 1936 fær tveir mans valdar inn á ting.

Sjálvstýrishøvdingurin, Jóannes Patursson, verður ósamdur við floksfelagar sínar um ein jarðarreform og hann tekur seg úr Sjálvstýrisflokkinum og fer uppí Vinnuflokkin í 1938.

Saman stovna hann og menninir aftanfyri Vinnuflokkin Fólkaflokkin, sum fyrstu ferð kemur inn á ting í 1940.

Enn syrgja trúgvir sambandsveljarar á Strondum og runt Eysturoynna fyri, at Johan Poulsen situr tryggur í løgtingssessi sínum.

Undir krígnum broytist tó alt fullkomiliga á Strondum.

Fólkaflokkurin tekur seg fram og veksur í stórum í bygdini.

Hvussu ber tað til, at so nógvir strandingar nú



velja Fólkaflokkin í staðin fyri Sambandsflokkin?

Gamla sambandsháborgin ristist á sínum grundvølli og er um at kollsigla.

Hin tryggi løgtingssessurin hjá Johan Poulsen hongur nú knappliga í einum klønum tráð.

Við valið í 1945 fær Fólkaflokkurin nærum líka nógvar atkvøður sum Sambandsflokkurin.

Fólkaflokkurin, sum hevur herrópið „radikalt sjálvstýri" í sínum skjaldarmerki, er við at yvirhálað Sambandsflokkin á Strondum.

Hvør man orsøkin vera til hesa kúvending hjá so nógvum strandingum?

Svarið er ikki at finna í spurninginum um loysing ella samband, enn minni um høgra ella vinstra í føroyskum politikki.

Orsøkin til, at Sambandsflokkurin gongur aftur og at Fólkaflokkinum gongur fram á Strondum er eitt ítøkiligt mál um eina kei, eina atløgu-bryggju.

Um hon skal liggja í Heygsstøð ella inni við Sjógv.

Arnold Abrahamsen er tannáringur, tá strandingar stríðast um, hvar henda atløgu-bryggjan skal liggja.



Johannes Johansen, *Johannes í Hoygarð*

## Jóhannes í Hoygarð er formaður í sóknarstýrunum undir krígnum

*Til 1. januar í 1952 fevndi Sjóvar sókn um bygdirnar Skálafirði, Skála, Innan Glyvur, Strendur, Kolbeinagjógv, Morskranes og Selatrað.*

*Tey, sum skyldaðu skatt, sleppa ikki at velja.*

**Frá januar 1939 til december 1942 sita hesir í sóknarstýrinum:**

Johannes Pauli Sofus Johansen, *Johannes í Hoygarð*, formaður
Sofus Jensen, *Sofus á Dul*, Strendur, næstformaður
Johan Johannesen (gamli lærari á Skála)
Hans J. Simonsen, Strendur
Símun Danielsen, *Símun hjá Durtu*, Strendur

**Frá januar 1943 til desember 1946 sita hesir í sóknarstýrinum:**

Johannes Pauli Sofus Johansen, brævsavnari, Strendur, formaður
Johan Lassen Fr. Weihe, keypmaður, Selatrað, næstformaður
Peter Rasmus Johannesen, motorpassari, Skála
Sofus Jensen, arbeiðsmaður, Strendur
Joen Johansen, *Jógvan í Gørðum*, kongsbóndi, Strendur

**Kelda:** Julia Kass/Sjóvar kommuna

Tað er hann, sum kemur at greiða okkum frá hesum eljustríði, sum mundi gjørt, at bygdin fer í tvíningar.

Frá gamlari tíð og til fyri fáum árum síðani hevur bygdin Strendur verið býtt upp millum „heimansmenn" og „uttansmenn".

Markið millum hesar báðar partar plagdi at vera Nýggjagerðisá.

Í tí stríðnum, sum frá 1939 til 1944 herjar í bygdini millum heimansmenn og uttansmenn og sum skapar mikla øsing millum manna, eru menn á Fløtunum og í Sjóvargerði í parti við heimansmonnum. Teir vera annars vanliga roknaðir sum uttansmenn.

Hetta hevur sína orsøk.

-Stríðið byrjar við, at mammubeiggi mín. Rasmus Rasmussen, *Rasmus á Ytru Trøð,* einaferð í 1939 orðar við Johan Poulsen, løgtingsmann, um at fáa gjørt eina kei í Heygsstøð, sigur Arnold Abrahamsen.

Rasmus hevur eisini lagt eina umsókn um hesa atløgubryggju fyri sóknarstýrið.

Sóknarstýrið biður Rasmus um fara runt við



Vit síggja oman á bryggjuna í Heygsstøð

eini adressu, har heitt verður á ymsar menn í bygdini um at skrivað undir eina áheitan um at byggja eina kei í Heygsstøð.

Tað nýtast ikki so nógvar undirskriftir, tí adressan skal bert verða ein áheitan á sóknarstýrið og Løgtingið um at fara í holt við fyrireikingar til hesa kei.

Rasmus skundar sær at fáa menn úr Gerðum og á Heyggi at skriva undir. Hann fer tó bert inn til teir, sum hann veit, taka undir við hesum máli.

Hann hevur skund, tí hann skal til skips dagin eftir.



Í Heygsstøð

Rasmus kemur ikki longur enn heim á Heyggj.

-Hetta var ikki so klókt gjørt av honum, tí um hann hevði spurt teir longur heimi, sum seinni føldu seg lopnar um, so hevði hann møguliga fingið nakrar undirskriftir afturat. Hetta hevði uttan iva tikið broddin av tí klandri, sum seinni tekur seg upp, sigur Arnold Abrahamsen.

Menn í Sjóvargerði og á Fløtunum, sum vanliga vera roknaðir til Heyggj, verða ikki spurdir. Teir koma av tí sama at vera hart ímóti uppskotinum hjá Rasmusi um at byggja eina kei í Heygsstøð.

Rasmus handar sama kvøld Johan Poulsen adressuna, sum hann stutt eftir leggur fyri tingið.

Sóknarstýrið, har teir flestu limirnir eru uttansmenn, góðtekur umsóknina og sendir eina áheitan til tingið um at gera eina kei í Heygsstøð.

Nú átti hetta bert at verið ein avgreiðsluspurningur og so hava strandingar eina kei í Heygsstøð.

Men so lætt gongur tað ikki.

Nú ressast heimansmenn.

Nú verður rok.

Heimansmenn fara nú eisini at ganga runt við eini adressu, har heitt verður á myndugleikarnar um at lata vera við at gera eina kei í Heygsstøð.

Teir siga, at skal ein kei gerast, skal hon sjálvandi gerast við Sjógv, tí har er meira kyrt enn úti í Heygsstøð.

Teir vilja eisini sleppa á tal við landsmyndugleikarnar.




Landsnevndin er ein 5-mannanevnd, sum stjórnar Føroyum undir krígnum, tá tingið ikki er saman.

Landsnevndarlimirnir eru úr Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum.

Tað er hesa nevnd, heimansmenn vilja hitta á máli.

Teir manna bát og fara til Havnar við motorbátinum hjá Annhús-monnunum, sum eitur *Tambarskelv.*

Har krevja teir, at atløgubryggjan undir ongum umstøðum verður bygd í Heygsstøð.

Teir fáa Poul Petersen, *Funnings-Pól,* og Thorstein Petersen, báðir úr Fólkaflokkinum, at hjálpa sær.

Uttansmenn fara eisini til Havnar at hitta Landsnevndina. Teir fara suður við *Togo* hjá Gigga á Høvdanum.

Teir hava løgtingsmannin Johan Poulsen úr Sambandsflokkinum at hjálpa sær.

Nú er politikkur komin uppí málið um atløgubryggjuna í Heygsstøð.

Fólkaflokkurin heldur við heimansmonnum, meðan Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin halda við uttansmonnum.

Hetta sæst eisini aftur á løgtingsvalinum - bæði


Ginni, Pidda, Erhard, Karl, Gigga

í 1943 og serliga í 1945.

Nú kókar á Strondum.

Tað nýggja sóknarstýrið, sum tekur við í januar 1943, samtykkir aftur við 3 atkvøðum, at atløgubryggjan skal gerast í Heygsstøð.

Ein av limunum í nýggja sóknarstýrinum, Jógvan Johansen, *Jógvan í Gørðum*, er valdur av heimansmonnum og væntað verður tí av honum, at hann fer at arbeiða ímóti keiætlanini í Heygsstøð.

Í fíggjarætlanina hjá sóknarstýrinum fyri hetta árið er ein postur til eina kei í Heygsstøð.

Jógvan skrivar undir hesa fíggjarætlan, tí sjálvandi skrivar hann undir tað, sum sóknar-



stýrið hevur viðtikið.

Heimansmenn eru í øðini og kenna seg sviknar.

-Teir geva manninum eyknevnið Göring eftir næsta manni Hitlers. Hetta vísir, hvussu hart klandrið var, sigur Arnold Abrahamsen.

Landsnevndin tekur í 1944 ta avgerð, at keiin skal byggjast í Heygsstøð og sama árið verður farið undir arbeiðið.

Sjálvt um tað er stórt arbeiðsloysi undir krígnum, kemur ongin sjóvarmaður ella nakar av Fløtunum til arbeiðis í Heygsstøð.

-Hetta var ikki bara tí, at teir vóru ímóti hesi kei, men eisini tí, at teir fóru at verða roknaðir sum svíkjarar, um teir teknaðu seg til


Vit síggja oman í Heygsstøð

arbeiðis í Heygsstøð, sigur Arnold Abrahamsen.

So nógvir mans tekna seg til at gera hesa kei, at arbeiðið verður býtt sundur, so menn sleppa at arbeiða í 14 dagar og hava so frí í 14.

Tímalønin er ikki serliga høg, bert 1,50 kr., sum er reiðiliga hálv løn.

Arbeiðið við at gera hesa kei tekur um 5 ár.

Løgtingsvalið árið eftir, í 1945, gevur mongum strandingi ein skelk – valið er ein *gysari,* sum onkur vildi sagt.

Teir flestu strandingar eru sambandsfólk, men nú hava heimansfólk hálsað um.

Fólkaflokkurin fær næstan líka nógvar atkvøður á Strondum sum Sambandsflokkurin. Tað resta bara 7 atkvøður í, so stendur á jøvnum.

Johan Poulsen bliknar alt meir og meir, so hvørt sum atkvøðurnar verða taldar upp í skúlanum.

Hann verður tó afturvaldur.

Atløgubryggjan í Heygsstøð kemur, men huglagið er dapurt millum bygdarfólkið.

Ein uttansmaður yrkir ein tátt til lagið


Niðri í Heygsstøð

*Karneval í Venedig,* sum ung sum eldri uttansfólk kvøða í skúlagarðinum, á vegnum og allastaðni, har tey kunnu arga heimansmenn.

Niðurlagið ljóðar soleiðis:

*Og sjóvarmenn teir stríðast,*
*men onga kei,*
*men onga kei teir fáa,*
*tí keiin kemur í Heygsstøð.*

So við og við slætnar sjógvurin millum heimansfólk og uttansfólk. Bygdin verður aftur ein eind. Luftin fer eisini skjótt úr Fólkafloksballónini.

Tað er sera lítil áhugi fyri fólkaatkvøðuni 14. september 1946 á Strondum og valluttøkan er av tí sama eisini lítil.

94 fólk eru fyri stjórnaruppskotinum, 67 velja



loysing og 2 atkvøður eru ógildigar.

Tá løgtingsvalið verður aftur 8. november í 1946 er alt aftur við tað gamla.

Johan Poulsen situr aftur tryggur í løgtingssessi sínum, men stríðið um atløgubryggjuna í Heygsstøð hevur givið honum nakað at hugsað um.

Arnold Abrahamsen hittir Johan Poulsen stutt eftir løgtingsvalið í 1945:

-Hann sigur við meg, at hann hevur rættiliga brent seg og slíkt ger hann ikki aftur. Eftir hetta blandar hann seg ongantíð aftur upp í lokalpolitikk á Strondum.

**Keldur:** Arnold Abrahamse, Einar Waag: *Val og valtøl 1906-1966*, Z. Wang: *Fólkaatkvøðan 14. September 1946, Føroyskir fólkaskúlalærarar 1870-1997*, ymiskar heimasíður, ymiskar munnligar frásagnir
**Myndir:** Úr myndasavninum hjá Lassa Borðoy, úr ymiskum heimasíðum